# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Sámal Júst Ziska Dahl 70 ár

Hósdagin 2. desember fylti ein vælkendur klaksvíkingur, Sámal Júst Dahl, fyrrverandi lærari, 70 ár.

Hann var borin í heim í Klaksvík 2. desember 1934, sonur Oluffu, f. Ziska, og Jógvan Ziska Dahl, bæði úr Klaksvík.

Pápin fórst undir krígnum við "Ekliptiku", helst á Sandoyarbankanum. So Sámal Júst kom at vaksa upp hjá mammuni saman við systkjunum Hermani og Karin Mariu ovast í Kirkjubrekkuni.

Her tróð hann barnaspor-ini bæði tá tátt og tá kavi var og varð longu góður skídrongur í stórkavanum, sum kom á kyndilsmessu í 1947.

Samstundis gjørdist hann skóti í Skótaliði Nólsoyar Páls, skótaliðnum hjá Roberti Joensen o.ø. Og tað var skjótt, at hann varð patruljuleiðari har og inti eitt valaverk innan fyri skótarørsluna, fyrst í kjallaranum í Fimleikarhøllini og frá 1950 í nýggju Uppistovu.

Seinni var hann við í Santa Jørundsgildi, felag av eldri skótum sum m.a. við risabingospølum í KÍ-høllini var við at leggja fíggjarligar karmar um nýggju skótahúsini.

Hann tók realprógv í Klaksvík í 1951 og arbeiddi so heima, til hann fór á læraraskúla í Haslev og tók prógv í 1957. Tá gingu eisini so mætir menn har sum Hilmar Bech, Jaspur í Rituvík, Eilif Samuelsen og Eldbjørn Joensen.

Sámal Júst gjørdist lærari við Klaksvíkar skúla og undirvísti í at kalla øllum vanligum lærugreinum. Hann var m.a. matematikari, fimur sum ein selur á sundi, urguleikari, sangari o.m.a., og tá skúlin varð sundurbýttur í 1979, kom hann oman í Ósáskúlan og spældi á flyglið og sang morgunsang.

Tá teldan sá dagsins ljós, legði hann til brots og gjørdist kunnugur teldu-



maður og kundi greiða bæði lærarum og næmingum frá teldunnar ABC og víðari loyndarmálum.

Sámal Júst var á DLH árini 1974-76 í eftirútbúgving og seinna árið undirvísti hann eisini við skúlan í Bagsværd.

1986/87 var hann kst. varaskúlastjóri við skúlan við Ósánna. Hann fór frá fyri aldur í 1997.

Hann spældi fótbólt í KÍ bæði í 2. og 1. deild. Hann hevur mong ítriv, hevur sungið í kóri og var dyggur stuðul í Dansifelagnum, í Fornminnafelagnum, var m.a. í áttamannafarinum á Norðoyastevnu og er ein primus motor í Bridgefelagnum og rættuliga kringur í bridge.

Sámal Júst giftist 5. november 1961 við Astrid, f. Lydersen, av Grømmanum á Viðareiði, og tey eiga synirnar Jógvan Ziska, Heina og Bjarna og eiga fleiri abba- og ommubørn.

Tey búgva við Kráargøtu í nágrenni barnaheimi hennara, og har er hugnaligt at koma á gátt eins og at njóta teirra frálíka urtagarð, sum er snotuligur og altíð væl røktur. Ella tú kemur innar til teirra á Grømmanum á Viðareiði, har tey eisini hava hús, og har tey eisini hava seyð inni um vetrarnar í seyðahúsinum.

Sámal Júst hevur arbeitt á seglvirki, síðan hann gavst í skúlanum, og er á floti viðhvørt.

Hjartaliga tillukku Sámal Júst og blíðan byr.

**Vinur**

## Jóhan M. Restorff 65 ár

Jóhan Martin Restofff er føddur í Havn 6. desember 1939. Hann er sonur Mariu, f. Joensen og Christian Dahl Restorff, sum bæði vóru havnarfólk. Abbarnir hjá Jóhan í báðar ættir vóru kendar havnarmyndir, Jóhan Restorff, ið var skipari og róptur kapteynurin og Hans Joensen, undir Kletti, ið var handilsmaður.

Føðingardagsbarnið, Jóhan Restorff, vaks upp fyrstu 9 árini av lívi sínum niðri á Áarvegnum, í barndómsheiminum hjá pápanum, sum stóð har niðasti parturin av Hotel Hafnia er. Í 1948 flutti húskið niðan á Hoyvíksvegin at búgva.

Jóhan gekk í skúla í gamla kommunuskúlanum, sum varð bygdur á Húsgarðsbønum seinast í 1890-unum. Hetta er prýðiligi bygningurin úr gróti, har býráðsumsitingin heldur til. Seinni fór Jóhan í realskúlan og tók prógv haðani.

Stutt eftir lokið realprógv fór Jóhan undir hotelútbúgving á Hotel Baltic í Nykøbing Falster í Danmark. Saman við honum fór eisini Ester, ættað úr Fuglafirði, sum hann giftist við í 1959.

Eftir lokna hotelútbúgving í 1960 kom Jóhan heimaftur á klettarnar at hjálpa pápa sínum, sum í 1950 hevði bygt Hotel Hafnia og var byrjaður hotelvirksemi saman við konu síni, Mariu. Hotel Hafnia hevur verið virkisøki og arbeiðsplássið hjá Jóhan síðani og myndaði hann, saman við faðiri sínum, leiðsluna á Hafnia árini fram til 1971, tá ið yngri beiggin, MC kom heimaftur, eisini eftir lokna útbúgving innan hotelfakið.

Jóhan og Ester fingu 4 børn: Christian, sum einans 5 ára gamal doyði av vanlukku yviri við strond í 1965, har ruskplássið í Tórshavnar



kommunu var tá. So er tað Katrin, Jan og Martin.

Ester, kona Jóhan, tók eisini útbúgving innan hotelfakið, samstundis sum Jóhan, á Hotel Baltic. Hon tók prógv sum smyrjibreyðskvinna og arbeiddi eisini á Hafnia í fleiri ár.

Umframt bróðirin MC, hevur Jóhan tvær systrar, Birgit og Kirstin, sum báðar hava arbeitt á Hafnia í mong ár.

Í arbeiði sínum sum hotellstjóri hevur Jóhan - eins og faðirin Christian Dahl Restorff - duga sera væl at vísa gestunum blíðskap, so hesir hava kent seg væl, bæði sum gistandi gestir og matgestir.

Jóhan hevur ikki einans verið hin føddi hotelverturin. Hann hevur eisini virkað á øðrum økjum. Hann hevur verið í sangkórinum í Ebenezer síðani hann var blaðungur og hevur við góðu sangrødd síni verið mikil stuðul har. Tey veiku og sjúku eiga góðar vinir í Jóhan og konuni Ester, sum mangan hava vitjað tey, ið hava serligan tørv og soleiðis lívgað mangan, ið tørvaði vinarhond og eitt gott orð - ikki minst andaliga. Hjartalagið fyri teim sjúku og veiku var eisini nakað, ið eyðkendi bæði foreldrini.

Mong eru tey, sum hava sitið gott í heiminum hjá Ester og Jóhan, bæði tá ið tey búðu á Húsabrúgv, í J. Paturssonargøtu, á Hoyvíksvegi og har tey nú búgva.

Trúgvin á Frelsaran, sum Jóhan og Ester lærdu at kenna í barnaárum, hevur verin berandi tátturin í lívi teirra, serstakliga tá ið sorgar- og sjúkuóløgi hava hótt við at taka tey av fótum. Men í øllum hesum eru tey í trúnni á Jesus borin ígjøgnum alt - til dagin í dag.

Vit ynskja Jóhan hjartaliga tillukku við teim sekstifimm og honum og Ester signing Guds framyvir, somuleiðis børnum og barnabørnum teirra.

Føðingardagin 6. desember kl. 9-12 eru fólk vælkomin á Parnassið á Hafnia at hitta Jóhan og fáa sær ein drekkamunn.

**Sv.**

## Jóan Pauli Joensen nýggjur rektari



*Rektaraskifti á Fróðskaparsetrinum 1. desember. Malan Marnersdóttir gevur nýggja rektaranum, Jóan Paula Joensen, lyklarnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

1. desember 2004 var rektaraskifti á Fróðskaparsetrinum. Jóan Pauli Joensen, professari, dr.phil & fil, tók við eftir Maluna Marnersdóttir, professara, dr.phil, sum hevur verið rektari síðani 1998, tvs. í tvey valskeið. Hann er valdur fyri eitt trý ára skeið til 30. november 2007, tá ið rektaraval aftur verður.

Malan Marnersdóttir hevur starvast á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum síðani 1983. Fyrstu trý árini sum adjunktur, men síðani 1986 sum lektari í bókmentum.

Jóan Pauli Joensen hevur verið í starvi á Fróskaparsetrinum síðani 1989, sama árið varð hann tilnevndur professari í siðsøgu og fólkalívsfrøði. Í 1998 og 1999 var hann professari í etnologi við Universitetið í Bergen.

**Dagurin**

**3. desember. Sveinur**. Teir vita einki um halgimenni við hesum navni.

Norrønt navn ið merkir *ungur maður.*